# ILA-koppseting er ongin loysn



*Føroyska alivinnan er í vanda og síðstu vikurnar hevur ILA-koppseting verið søgd at verða bjargingin, men sambært landsdjóralæknanum er koppsetingin í sjálvum sær einki gandaorð*

*Myndaviðgerð: Jens Kr. Vang*

**Koppseting ímóti ILA er onki gandaorð, men tvíeggjað svørð. Onki góðkent koppingarevni er og talan verður um eitt slag av royndarætlan. Eisini eru tað bert Canada og USA, sum koppseta, so alarar á okkara leiðum nýta kanska møguleikan at sleppa av við ein kappingarneyta, sigur landsdjóralæknin um støðuna í alivinnuni. – Halda vit, at bert vit koppseta fisk, so er alt loyst, so verða vit skuffað, sigur Bjørn Harlou**

ALIVINNA
*Dagfinn Olsen*

Um ES gevur loyvi til koppseting ímóti ILA, so hendir tað í fyrsta lagi einaferð í heyst, men so gongur rúm tíð, áðrenn koppsett smolt kann setast út, so tað er ikki fyrr enn einaferð komandi vár, at vit tosa um veruligu ávirkanina.

Hetta sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni, sum leggur afturat, at vónin er, at loyvið frá ES kemur í heyst, men at hetta sostatt ikki er heilt víst.

### Ikki gandaorð

Hóast tað síðstu tíðina hevur ljóðað frá kreppuraktu alivinnuni, sum er koppseting ímóti ILA-sjúkuni einasta loysn og eitt satt gandaorð, so er hetta ikki veruleikin, sambært landsdjóralæknanum.

Men um koppseting ikki er veruleiki fyrr enn komandi vár, hvussu nógv er tá eftir av alivinnuni í Føroyum.

– Trupuleikin vit hava er ILA-sjúkan og ein trupulleiki, sum vit hava havt longri enn ILA, nevniliga BKD, ið er eitt slag av nýrasjúku, sigur Bjørn Harlou.

– Nú skal eg ikki koma við eini fíggjarligari meting, tí tað er ikki til mín at meta um, men støðan er ikki ljósareyð, sigur Bjørn Harlou.

– Men koppseting er ikki nøkur loysn í sjálvum sær, men er bert eitt amboð, sum vit kunnu taka í nýtslu, sigur landsdjóralæknin, sum harvið skumpar av vegnum allar vónir um koppseting sum eitt satt gandaorð og endaliga loysn.

– Koppseting merkir ikki, at fiskur ikki gerst sjúkur ella kann smitta annan fisk, altso eru smittuberari, men fiskur doyr tó ikki, er hann koppsettur.Esini er munur á sjúkum og á koppsetingarevnum, so hetta er ein fløktur trupulleiki, viðgongur Bjørn Harlou.

– Halda vit, at bert vit koppseta fisk, so er alt loyst, so verða vit skuffað, sigur Bjørn Harlou.

– Talan er í veruleikanum um tvíeggjað svørð, tí sjálvsagt bøtir um at koppseta, men við koppsetingini er eisini verri at vita, hvar smittan er, so koppsett verður helst í tveimum fremleiðsluumførum og so verður mett um, sigur Bjørn Harlou.

### Onki góðkent koppingarevni

Vit hava útflutt sjálvdeyðan fisk til ES, sum skal góðkenna koppsetingina í Føroyum. Fær hetta ávirkan á støðuna?

– Teir, ið taka avgerðirnar eru helst somikið at sær komnir, at teir gera tað á sakligum grundarlag, men eg vil siga tað soleiðis, at hetta fremur ikki okkara søk, staðfestir landsdjóralæknin.

– Tað er bert í Canada og í USA, at koppsett verður innan alivinnu. Tað er tí ikki óhugsandi, at framleiðarar á okkara leiðum fara at nýta møguleikan at sleppa av við ein kappingarneyta. Harafturat finst onki góðkent koppingarevni, so vit mugu gera eitt slag av verkætlan, talan verður um eina stóra feltroynd og tí mugu vit eisni vera varin og ikki gera okkum ov høgar vónir, tí ongin kennir útfallið, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni.

– Koppingarevnið í Canada til dømis, er gjørt til canadisku virusstammuna, sum er heilt øðrvísi virus, enn tað vit síggja her hjá okkum. Talan er um nógvar ótryggar faktorar, tá vit tosa um ILA-sjúku og koppseting, sigur Bjørn Harlou, sum staðfestir, at koppseting í sær sjálvum er ikki endalig loysn og als einki gandaorð.

– Koppseting í sær sjálvum ger ikki munin. Onnur tiltøk eru av stórum týdningi. Tá smitta er, so er skjót útslakting neyðug, so smitta ikki verður millum ættarliðini. Brúkini mugu liggja brakk, talan má vera um tað, ið tey aðrastaðni kalla »alt út, alt inn«.

– Hví verður tað ikki gjørt í dag, um tað er hetta, sum hevur størsta týdningin?

– Tað verður gjørt,men alibrúkini liggja síðu um síðu og ymsir eigarar eru, og tað er ikki altíð, at gingið verður í takt, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni.



*Halda vit, at ILA-koppseting er endalig loysn í sjálvum sær, verða vit skuffað, sigur Bjørn Harlou, ið vísir á, at mótvegis teimum ábendingum, ið hava verið, so krevst meira enn bert koppseting fyri at koma ILA-sjúkuni til lívs*

*Mynd: Savnsmynd*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Sigurd Berghamar farin



Í dag verður Sigurd Berghamar borin út úr Ebenezer. Hann andaðist mánadagin 21. juli, 92 ára gamalur og mettur av døgum. Nú er kapitli í hugnaliga heiminum á Dalavegnum ella Dalatúni, sum tað nú eitur, liðugt. Tinna, konan, sum var ættað av Toftum, doyði í 1994, og húsini, sum tey lótu byggja nakað eftir kríggið, eru farin á aðrar hendur. Húsini vóru karmur um gudsóttandi og gestablítt heim, har Tinna var miðdepulin og altíð inni, og har skyldfólk og vinfólk hjá teimum eldru og yngru komu og fóru. Sigurd vísti øllum teimum vitjandi áhugað, og á sín serstaka hátt var hann skemtingarsamur, spældi við orð og vendingar og var so ógvuliga beinrakin.

Tinna og Sigurd fingu fýra børn: Gunnvør, Øssur, Rúna og Erla. Tær búgva allar í høvuðsstaðnum, og Øssur býr í Keypmannahavn.

Sigurd var sonur Mariu, sum var ættað úr Havnini og varð nevnd Maria hjá Konradi og var lærarinna, og Jóhannes Joensen, sum var ættaður av Selatrað og vaks upp á Trøllanesi og varð nevndur Jóhannes á Nesi. Tey fingu trý børn, sum øll bygdu við Dalavegin í Havn: Conrad, Sigurd og Jóna.

Sum heilt ungur fór Sigurd á skrivstovuni hjá Kjølbro. Hetta var seinnapartin av tjúgunum og fyrst í tredivunum, tá virkið hjá J.F. Kjølbro vaks við nógvari ferð.

Eftir at Sigurd var fluttur til Havnar, var hann í Sjóvinnubankanum, sum sá dagsins ljós í 1932. Eftir kríggið fór Esmar Fuglø at selja olju, og Sigurd var frá tí fyrsta við í Føroysk Oljusøla, sum felagið hjá Esmari nevndist. Í endurminningum sínum sigur Esmar, at hann helt sjálvur fram at sigla, og at Sigurd tók sær av Føroysk Oljusøla frá byrjan av og gjørdi tað til lítar, og at nógv hvíldi á Sigurdi, sum var bókhaldari og var einsamallur heima og fekk alt at ganga.

Tá ið Esmar seldi sítt felag til Esso og gjørdist stjóri har, fór eisini Sigurd í tænastu hjá Esso, og har var hann, inntil hann varð pensióneraður.

Sigurd Berghamar hevði stóran áhuga fyri og kunnleika í føroyska málinum. Áhugan fyri málinum mundi hann hava fingið frá mammuni, sum segðist hava gott tak á føroyska málinum. Máloyrað og áhugin saman við hjartalagi og trúfesti hansara fyri orði Guds og virkseminum í brøðrasamkomunum hevði við sær, at tað rann saman millum Sigurd og Victor Danielsen, sum arbeiddi við bibliuumseting og útgávu og við at umseta og yrkja sangir og at geva teir út.

Í 1985 gav Hin Føroyski Bíbliugrunnurin út Bíbliuorðabókina, sum Sigurd Berghamar hevði skrivað. Hana fekk hann M.A. Jacobsens virðisløn fyri.

Í formælinum til Bíbliuorðabókina greiðir høvundin soleiðis frá: »Øll míni barnaár og nakað upp í árini hoyrdi eg orð Guds kunngjørt á móðurmálinum, meðan tað, sum lisið varð upp, var á donskum ella norskum, tí føroysk bíblia var eingin.

Tá ið Victor Danielsen hevði umsett Nýggja Testamenti til føroyskt – tað kom út í 1937 – kom eg eitt sindur uppí við rættlestri o.ø. Í 1949 kom hin fyrsta føroyska bíblian, og vóru vit tá nakrir við at rættlesa og saman við Victor at fylgja við prentingini. Somuleiðis var eg við til arbeiðið við ta endurskoðaðu bíbliuútgávuna, sum kom út í 1975. – Hin bíbliuumsetingin (J. Dahl o.a.) kom út í 1961.

Mær gjørdist greitt, at vit áttu at fáa føroyska bíbliuorðabók, og vón mín var, at onkur fór undir hetta verk. Áðrenn føroysk bíblia kom, lá væl fyri at brúka norska orðabók, og hon verður vanliga brúkt enn. Men sum árini gingu og eitt ættarlið vaks upp við føroyskari bíbliu, gjørdist tørvurin størri at fáa føroyska orðabók. Endin varð, at eg fór at royna sjálvur at fáa hana skrivaða, og úrslitið er so her«, segði Sigurd Berghamar í juli í 1985. Og so legði hann afturat – og hetta lýsir væl hansara lív, hugburð og tráðan – at »bókin verður nú útgivin við bøn um, at hon kann veita bæði ungum og eldri hjálp til at koma at kenna Heiløgu Skriftirnar betur«.

Eftir at Bíbliuorðabókin var útkomin, fór Sigurd miðvíst undir at savna, skipa og skriva søguna hjá brøðrunum, og í 1992 gav hann út »– men Gud gav vøkst«, (heitið sipar til tað, sum Paulis sigur í 1. Kor. 3,6) eina bók, sum snýr seg um William Sloan og fyrstu samkomurnar í Føroyum. Harvið syrgdi Sigurd fyri, at hesin parturin av søguni varð skrivaður fram til gamli Sloan doyði í 1914, ella fýra ár eftir, at Sigurd Berghamar var borin í heim.

## Minningarorð um systir mína Synnøve
### 17.01.1976-24.03.2003



Tað vóru eini tung boð at fáa, tá tú mín elskaða systir so brádliga doyði. Eg visti væl, at tú var sjúk, men vónaði allatíðina, at tú fór at gerast frísk. Sjálv hevði tú so gott mót, og uggaði okkum øll við tínum lætta sinni.

Vit vóru ógvuliga góðar systrar, vit vóru altíð saman og søgdu hvørjari aðrari alt. Vit búðu saman í Havn og hjálptu hvørjari aðrari við øllum. Tú var altíð í góðum lag, og tað var altíð stuttligt at vera saman við tær.

Saknurin er sera stórur, og tað er ringt at koma víðari, men eg veit, at nú hevur tú tað gott.

Takk fyri alt tú var fyri meg.

Hvíl í friði góða systir.

***Joan***

## Dagurin

24. juli. Kristin. Eftir halgisøguni er talan um eina ellivu ára gamla gentu, sum verður tikin av døgum, av tí at hon breyt nakrar skurðgudamyndir og gav teimum fátæku gullið og tað dýra tilfarið, tær vóru gjørdar av. Annars hava tvær halgar kvinnur 24. juli sum minningardag, Sankta Kristina úr Týrus og Sankta Kristina úr Bolsena.

## »Ferðslan 2002« svart upp á hvítt




**Skjótt tjúgunda árið á rað gevur Landsverkfrøðingurin út bóklingin »Ferðslan«, sum gjøgnum tíðina hevur verið eitt hent amboð hjá myndugleikunum í teirra arbeiði og framtíðarætlanum. Hjá Landsverkfrøðinginum siga tey, at áhugin fyri bóklinginum er støðugt vaksandi.**

TÍÐINDASKRIV
*Landsverkfrøðingurin*

Síðan mitt í 80'unum hevur Landsverkfrøðingurin givið út bóklingin »Ferðslan« – ein upp á seg lítil bóklingur, men við eini ørgrynnu av áhugaverdum hagtølum og upplýsingum av ymiskum slagi, sum øll hava við ferðslu at gera. Í formælinum verður sagt, at frágreiðingin er í høvuðsheitum upplýsingar um ferðsluna á landsvegunum og viðkomandi upplýsingar um landsvegakervið. Í bóklinginum eru eisini upplýsingar um ferðsluóhappini á kommunalu vegunum. Har eru upplýsingar um t.d. ferðmátingar, ferðsluteljingar, millumlanda flogferðslu og skipaferðslu. Eisini er skrá yvir tunnlar, tyrlupallar, landsvegir og vegalongdir. Ein sera hentur bóklingur við nógvum viðkomandi upplýsingum. Keldurnar eru: Løgreglan, Bileftirlitið, Ferðaráð Føroya, Statens Luftfartsvæsen og Tórshavnar kommuna.


## Nøvn í vikuni

### Kennir tú onkran …



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:..........................................................................................
Bústaður:......................................................................................
Bygd/býur:.......................................................Tel:..................................
Evt. arbeiðspláss:.............................................................................

Merkisdagurin er: ...........................................................................

Innsendari: .................................................................Tel:............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo